LØGMÁLARÁÐIÐ

Føroya Kommunufelag
Frammi í Gerði 1
340 Kvívík

INN: 27 AUG. 2008

25. august 2008
Mál: 4742-002/08-8
Tygara skriv:
Viðgjørt: PL

**Fíggjarligur stuðul frá føroyskum kommunum til Skálavíkar kommunu**

Í sambandi við teir skaðar, ið havnalagið í Skálavíkar kommunu fekk í Kyndilsmessuódnini í januar í ár, er Løgmálaráðið vorið kunnugt um, at ávísar føroyskar kommunur í hesum sambandi hava tikið avgerð um at veita fíggjarligan stuðul til Skálavíkar kommunu.

Við heimild í óskrivaðu kommunufulltrúini hava kommunur í ávísan mun uttan lógarheimild sjálvstøðugt fíggjarligt ræði; tvs. at kommunurnar sjálvar gera av hvussu peningur kommununar verður nýttur. Henda heimild er tó ikki óavmarkað.

Grundleggjandi treytin fyri kommunalum stuðli er, at hesin er stílaður borgarunum í kommununi (sokallaða lokalitetsprincippið) og ikki aðrari kommunu ella størri landafrøðiligum øki. Sostatt kann ein kommuna sum útgangsstøði ikki veita stuðul, ið einans ella í avgerandi mun kemur borgarum uttan fyri kommununa til góðar.

Tað kann tó eftir umstøðunum vera lógligt at ein kommuna átekur sær uppgávur, ið liggja uttanfyri staðbundna økið í kommununi. Avgerandi í tílíkum føri er, um uppgávan er av áhuga fyri viðkomandi kommunu og borgarar hennara – í mun til uppgávur, ið einans ella í avgerandi mun eru av áhuga fyri borgarar í aðrari kommunu.

Eitt serligt økið, har víkt verður frá lokalitetsprincippinum, er stuðul til innsavnan til humaniter endamál, sum koma borgarum í útlandinum til góðar. Í tílíkum føri er mett, at kommunur kunnu veita avmarkaðan peningaligan stuðul. Í slíkum føri er vanligt, at landið eisini stuðlar, og er hesin stuðul avgerandi fyri, hvussu stórar upphæddir kommunurnar kunnu lata.

Løgmálaráðið metir ikki, at til ber at samanbera stuðul til innsavnan til humaniter endamál, sum talan m.a. var um, tá kommunur í Føroyum veittu stuðul í sambandi við skalvalop í Íslandi og tsunami vanlukku í Asiu, og stuðul til Skálavíkar kommunu í sambandi við Kyndilsmessuódnina.

Í sambandi við stuðulin til Skálavíkar kommunu var hvørki talan um skipaða innsavnan – kommunurnar hava av sínum eintingum tikið avgerð um at veita fíggjarligan stuðul – ella humanitert endamál.

Løgmálaráðið metir harafturat ikki, at avgerð um at lata fíggjarligan stuðul til Skálavíkar kommunu er av áhuga fyri borgararnar í øðrum føroyskum kommunum. Borgararnir í hesum kommunum fáa ongan ágóða av stuðulinum, og er hetta eitt krav, sum ikki verður víkið frá sambært kommunufulltrúini.

Grundað á omanfyristandandi er Løgmálaráðið komið til ta niðurstøðu, at føroyskar kommunur ikki hava heimild at veita fíggjarligan stuðul til Skálavíkar kommunu í sambandi við Kyndilsmessuódnina.

Løgmálaráðið skal í hesum sambandi minna kommunurnar á, at hesar í sambandi við avgerðir um stuðul hava skyldu at tryggja sær, at heimild fyriliggur. Kommunustýrið hevur í hesum sambandi skyldu at vera vitandi um lógargrundarlag kommunustýrisins, ið útyvir kommunustýrislógina og aðrar skrivaðar reglur eisini fevnir um óskrivaðan rætt, herundir kommunufulltrúina.

Hetta skriv er sent øllum kommunum í Føroyum eins og Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya.

Vegna Løgmálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri